## Tryggir vegir

**Trygd:** Seinastu tríati árini hevur Landsverk arbeitt miðvíst við at bøta um trygdina hjá teim ferðandi á landsvegunum.

Hetta arbeiðið er m.a. gjørt við at merkja vegir, seta upp vegstokkar, gera busslummar og gongubreytir og at seta upp gøtuljós.

Í ársfrágreiðingini fyri 2004 vísir Landsverk á, at føroyskir myndugleikar hava eftirlyst ein politikk innan ferðslutrygd í Føroyum.

Sagt verður, at Ferðslutrygd arbeiðir við Nullhugsjónini, og at Landsverk er ein týðandi partur av hesum arbeiði.

**sb.**

## Merktir vegir

**Merking:** Seinasta ár vórðu íalt merktir 1054 km. av føroysku vegunum.

Eitt yvirlit frá Landsverki vísir, at 338 km. vórðu málaðir á Eysturoynni, 321 á Streymoynni og 144 km. á Suðuroynni.

Í Norðoyggjum vórðu málaðir 98 km., í Vágum 83 og á Sandoynni 70 km.

Hetta var nakað minni enn í 2003, tá Landsverk merkti 1058 km. kring landið.

**sb.**

## Sama tal av ferðsluóhappum

**Óhapp:** Hagtøl frá Landsverki vísa, at í fjør vóru íalt 357 ferðsluóhapp á landsvegunum, samanborið við 311 árið fyri.

Av óhappunum í 2004 høvdu 55 teirra stóran materiellan skaða, og í 23 teirra var talan eisini um fólkaskaða. Bæði árini doyðu tvey fólk í ferðsluni á landsvegunum, meðan bert eitt fólk doyði á kommunalu vegunum í fjør.

Um hugt verður eftir ferðsluóhappum á teimum kommunalu vegunum, so er hinvegin talan um eina minking.

Í 2003 vórðu skrásett 831 ferðsluóhapp á hesum støðum, meðan talið í fjør var komið niður á 782.

Verða bæði tølini løgd saman so sæst kortini, at talið av ferðsluóhappum á landsvegunum og teimum kommunalu vegunum hevur verið tað sama bæði árini, nevniliga 1142 íalt.

**sb.**

# RFF: Koyrivitanin má haldast viðlíka



*Broytingar verða framdar í ferðslulógini í framtíðini, bæði tá talan er um tað at ogna sær eitt koyrikort og við møguleikunum at revsa lógarbrot*

**- Tað er sum kunnugt galdandi fyri alla útbúgving, at verður hon ikki hildin viðlíka, so fer tað sum er lært so líðandi í gloymskuna, sigur Ferðslutrygd í sambandi við Nullhugsjónina. Skotið verður tí upp at hava eitt kravt ferðsluskeið 7. hvørt ár**

FERÐSLUTRYGD
*Snorri Brend*

**Koyring:** Støðan er ikki ókend: Tú kemur koyrandi eftir einrættaðum vegi. Og brádliga møtir tú einum bili, sum koyrir ímóti ferðsluni

Tú hevur kanska eisini sæð bilførarar snara inn á ein veg, har skeltini greitt vísa, at øll innkoyring er bannað.

Og tú hevur kanska eisini sæð og uppliva bilførarar sum snara til vinstru inn í eina rundkoyring.

Hetta eru alt dømi um støður, har bilførarin ikki er nóg kunnugur við tær lógir, skelti og reglur sum eru galdandi á ferðsluøkinum.

Ein háttur at bøta um hesi viðurskifti, ið kunnu gerast vandamikil fyri bilføraran sjálvan og onnur í fersluni, er við teim hugskotinum, sum arbeitt verður við í løtuni í Føroyum og í ES – at herða krøvini til koyrikortini.

Ein nýggju kunngerð um koyrikort er á veg, og verður hon lýst um ein mánað ella so. Her fæst so meiri at vita um, hvørji krøv hereftir fara at verða sett føroyskum bilførarum.

### 100 ymisk koyrikort

Tað er rættiliga ymiskt, hvørji krøv verða sett til tey, sum taka koyrikort.

Í Føroyum og Danmark skal ein verða fyltur 18 ár fyri at fáa koyrikort og er tað galdandi til ein er fyltur sjúti ár.

Eisini í ES-londunum er rættiliga stórur munur á, hvussu leingi koyrikortini eru galdandi. Sum dømi kann nevnast, at tey sum taka koyrikort í Týsklandi fáa eitt koyrikort, sum er galdandi alt lívið, meðan svenska koyrikortið skal endurnýggjast 10. hvørt ár.

Sum nevnt her í blaðnum í farnu viku, so eru í løtuni umleið 110 ymisk sløg av koyrikortum og koyrikortskipanum í ES-londunum. Av hesi orsøk hevur ein í ES hildið tað verið neyðugt at samskipa krøvini, og fáa sett í gildi avmarkingar, sum skulu vera galdandi í øllum ES londunum.

Hetta arbeiðið er komið so mikið langt, at roknað verður við, at nýggju reglurnar fara at krevja, at koyrikortið skal endurnýggjast 10. hvørt ár, og at tað í hesum sambandi skulu setast serlig krøv til sjónina hjá teimum, sum eru oman fyri 45 ár.

### 7. hvørt ár

Ráðið fyri Ferðslutrygd (RFF) er sum vera man eisini áhugað í slíkum spurningum, og hevur tí arbeitt fram ímóti at fáa sett Nullhugsjónina í verk av álvara.

Í Ferðslutrygd er ein sjálvandi fegin um allar broytingar til frama fyri ferðslutrygdina, eisini her á landi. Hetta sæst m.a. aftur á heimasíðu teirra, tá tosað verður um hesa hugsjón.

Víst verður m.a. til orðingina í álitinum um Nullhugsjónina, har skotið verður upp, at øll, ið hava koyrikort, eiga at koma á eitt kravt ferðsluskeið 7. hvørt ár, so tey fáa høvi at dagføra sína vitan og sín førleika.

Í hesum sama áliti eru eisini gjørdar meira generellar viðmerkingar til tað at taka koyrikort.

Her verður víst á, at tá talan er um útbúgving, so er tað ein sannroynd, at verður hon ikki hildin viðlíka, so fer tað, sum lært hevur verið, so líðandi í gloymskuna.

Um koyrt verður regluliga, so verður tann praktiski parturin støðugt mentur, sum frá líður. Men verri er við tí teoretiska partinum, sum varð lærdur, tá fólk tóku koyrikort sítt á sinni, men sum kanska bert hendinga ferð skal standa sína roynd í ferðsluni.

### Illa fyri

RFF vísir á, at tað munnu vera nógvir bilførarar, sum næstan bara nýta bilin í sambandi við sítt arbeiði og tey ørindi, sum gjørd verða har á staðnum.

Hjá fólki á bygd, og sum ikki arbeiða í Havn, er helst bert talan um onkran hendinga Havnartúr ella onnur støð. Á hesum støðum eru nógv fleiri vegamerkingar og skelti at hugsa um, enn bilførarin annars er vanur við í heimbygdini.

Ein onnur sannroynd er so hon, at sum árini ganga, broytast eisini býarmyndirnar við m.a. nýggjum vegum, skeltum, ferðsluljósum, vegamerkingum og rundkoyringum. Tí er kanska ikki so løgið, um mangur bilførari, ið ikki vanliga koyrir hesar leiðir, kennir seg eitt sindur ørkymlaðan.

Eitt annað og ikki minni álvaramál er so tað, at alt fleiri og fleiri føroyingar fara nú á hvørjum ári í útlondini at ferðast við húski sínum í bili. Her kunnu teir mangan koyra í ferðslukervum og undir umstøðum, sum eru fullkomiliga fremmand og tí ókend fyri mongum føroyskum bilførara.

- Veruleikin sýnir okkum eisini, at tað eru nógvir føroyingar, ið eru komnir illa fyri av hesum ávum, sigur RFF.

## FAKTA

### Nullhugsjón

RFF hevur tillagað ta svensku nullhugsjónina til føroysk viðurskifti. Her hevur ein sum mál at eingin skal doyggja ella koma álvarsliga til skaða í ferðsluni. Sagt verður, at henda hugsjónin er væl móttikin í Føroyum og hevur longu havt ávirkan á arbeiðið við ferðslutrygdini.

## Fakta

### Herd lóg

Nýggja koyrikortkunngerðin er sera umfatandi (96 paragraffir og 7 fylgiskjøl), og verður lýst um ein mánað ella so. Hon kemur eftir ætlan í gildi 1. januar 2006.

Tá hesar herdu reglurnar koma í gildi á nýggjárinum kann ein m.a. missa koyrikortið beinanvegin um koyrt verður skjótari enn eitt vist. Ein onnur broyting verður, at á tvey hjólaðum prutli er bert loyvt einum persóni at sita – t.v.s. at loyvt verður ikki at hava ferðandi við.